

*Vestanstevnu kappróðurin verður fluttur tveir tímar í mun til tað, vanligt er á summarstevnunum, orsakað av sjóvarfallinum. Róð verður klokkan fimm seinnapartin. Fjøra er klokkan trý, og tá er turt rættiliga langt út á vágna*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Frá fólkafundi til rekakapping

**Bæði vanlig stevnutiltøk og heldur forkunnugari tiltøk verða at síggja og uppliva á Vestanstevnu í Miðvági komandi vikuskifti. Eitt nú ber til at keypa lutaseðil upp á ein reka, sum gevur møguleika fyri sera góðum viningum**

VESTANSTEVNA
*Edvard Joensen*

**Miðvági:** Vestanstevnuskráin er fjølbroytt, og ymisk tiltøk eru á skránni, sum ikki eru roynd fyrr. Eitt nú ber til at keypa sær ein reka og vinna eina familjuferð til Noregs, um ein er heppin.

At keypa sær ein lutaseðlareka, er ikki nakað, tey hava hoyrt um fyrr, siga tey, sum fyrireika Vestanstevnuna. Men tey vænta, at nú fer hvør maður í Vágum at royna at gera Sámali Mathiasi kynstrið eftir og vilja vera besti rekamaður á staðnum.

Søgan er tann, sigur Sólfríð Fjalsbak, formaður í stevnunevndini, at tey fara at selja lutaseðlar á kr. 100,- undan stevnuni. Við hesum seðlinum fylgir ein træpinnur, sum hevur sama nummar sum seðilin. Hetta træið verður ikki latið út saman viðseðlinum, men goymt til seinnapartin sunnudagin, tá ein sonevnd rekakapping verður í Ósanum.

Undirhald verður í Ósanum, har byrging verður gjørd um ánna. Partur av hesum tiltakinum er, at hesir træpinnarnir verða sleptir í ánna oman fyri Bygdarhúsið og skulu so reka oman á byrgingina. Tann rekin, sum fyrstur verður á mál, vinnur høvuðsvinningin. Aðrir vinningar vera eisini.

Tað ræður um at skunda sær at keypa seðil, tí talið er avmarkað, sigur stevnunevndin.

## Framsýningar

Umframt traditionellu tiltøkini sum Tivoli og ítróttartiltøk av ymsum sløgum, bjargingarroynd, møti og dans, verða eisini ymsar framsýningar á Vestanstevnu.

Sunnudagin klokkan 14.00 fara seyðahundar ymsataðni úr landinum at vísa síni kynstur, tá teir fara at reka seyð á fótbóltsvøllinum. Hendan framsýningin er samstundis kapping millum hundarnar.

Tríggjar aðrar áhugaverdar framsýningar verða eisini á stevnuni, siga fyrireikararnir.

Í Bygdarskúlanum verður ein listaframsýning, har fleiri kend og minni kend listafólk fara at vísa síni verk fram.

Men eisini annað áhugavert verður at síggja í skúlanum á Vestanstevnu.

Fólk hava ymisk áhugamál, og summi hava góðan hug at samla. Bæði líkt og ólíkt. Og tá savnið verður nóg stórt, gerst tað mangan áhugavert hjá øðrum at síggja.

Soleiðis fer at bera til á Vestanstevnu at síggja søvn av lyklaringum, salt- og piparbússum, kannum, eins og Føroya størsta ølsamling eisini veður víst fram hesar dagarnar.

Á pallinum verður livandi tónleikur. Atgongumerkið til framsýningina í skúlanum kostar 30,- krónur. Børn sleppa ókeypis inn saman við vaksnum.

Í kjallarahæddini hjá Godtfred Joensen fer Malan á Lofti, sum er nýútbúgvin sniðskeri, designari, at sýna fram klæði, hon hevur gjørt. Alt tilfarið, hon brúkar, er føroyskt.

Millum tað, sýnt veru fram, er eisini høvuðsuppgáva hennara, sum gjørd varð í amband við próvtøku, og sum fekk sera góðan karakter.

Eisini hesa framsýningina kostar tað kr. 30,- at síggja, eins og børnini sleppa ókeypis inn saman við teimum vaksnu.

Ein triðja framsýning, sum er á Vestanstevnu, verður á Ellisheiminum. Hon sýnir samferðslu fram gjøgnum tíðina.

Tá hugsað og tosað verður um samferðslu í Vágum í dag, er tað umframt flogvøllin serliga Undirsjóvartunnilin, hugsað verður um. Og á framsýningin á Ellisheiminum verður eisini nógv at síggja, sum lýsir gongdina við undirsjóvartunlinum frá hugskoti fram til dagin í dag. Eisini her er kostnaðurin settur til kr. 30,-, og børnini sleppa ókeypis inn saman við vaksnum fólki.

## Fundir og konsert

Hóast Vestanstevnuskráin byrjar longu hóskvøldið, verður stevnan sjálv sett leygardagin klokkan 14.00. Tað verður Jóan Pauli Frederiksen, borgarstjóri í Miðvági, sum fer at seta stevnuna.

Sum slíkur stevnum líkt, verður eisini midnáttarsamkoma leygarkvøldið. Byrjað verður við kyndlagongu klokkan 23.30. Midnáttarrøðuna fer Ronald Poulsen at halda, og aftan á verður fýrverkarí at síggja.

Sunnudagin klokkan 18.00 verður fólkafundur á Tungu, har útvarpsstjórin, Jógvan Jespersen, fer at halda røðu. Tá hann er liðugur at røða, verður tikið saman í ring, og onkur vísa verður kvøðin.

Ymisk tónleikatiltøk verða eisini á stevnuni. Gospelkonsert verður uttan fyri Filadelfia leygarkvøldið klokkan 21.00, har bólkarnir "Z-Free" og "MMM" fara at spæla. Aftan á verður opið hús í Missiónshúsinum.

Fyri fyrstu ferð nakrantíð verður á Vestanstevnu konsert í ítróttarhøllini á Giljanesi. Hon verður á midnátt leygarkvøldið, og har fara bólkarnir "All That Rain", "Side Effect" og "Flux" at spæla.

Eisini verður dansur í Miðvági á vestanstevnu. Hann verður í tjaldinum, sum sett verður upp á hondbóltsvøllinum. Fríggjakvøldið fer "All That Rain" at spæla. og leygarkvøldið verður tað "Bimbs". Eisini sunnukvøldið verður dansur í tjaldinum.

Umfram verður ein hópur av tiltøkum. Bæði vanligum stevnutiltøkum sum Tivoli, bóltkappingum eisini og meira forkunnugum, at uppliva á stevnuni. Tey síggjast í stevnuskránni, sum er prentað aðrastaðni í blaðnum.




fk

Vestanstevnutilboð

frá Føroya Keypssamtøkuni í Miðvági

Tilboðini eru galdandi frá fríggjadegi 10. og 13 juli 2002 ella so leingi vøran er á goymslu. Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum. Heimasíðan hjá FK: http://fk.olivant.fo/

Keypssamtøkan ynskir góða vestanstevnu



6x1,5 ltr. sodavatn 69⁹⁵



Tunnocs Caramel
8-pakki fyri 15⁹⁵



Ymisk frukt
8 fyri 20⁰⁰



Ístertur frá Fóm 26⁹⁵



Danefrost grønmeti
2x750 g fyri 24⁹⁵



Kotilettir
fyri kg 52⁹⁰



Merrild kaffi 500 g 16⁹⁵



Harragarðsreyðkál
1 kg fyri 16⁹⁵



Nakkasteikir
fyri kg 39⁹⁰



Niðursjóðað frukt Ferskur og perur 2 bl. á 820 g 14⁹⁵



Taffel kips
300 g fyri 14⁹⁵



Neytabógvur
fyri kg 49⁹⁰